# Nú skulu vit standa okkara roynd

**– Onki bendir á, at inntøkurnar hjá landskassanum fara at hækka. Tí mugu vit antin seta sparingar í verk ella mugu vit hækka skattin, sigur Andreas Petersen, løgtingsmaður**

FÍGGJARLIG ÚTLIT
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Samgongan má síggja veruleikan í eyguni, sigur Andreas Petersen, løgtingsmaður, sum sjálvur er í samgongu*

– Í ár hava vit eitt undirskot uppá 277 milliónir. Men næsta ár má undirskotið verða minni.

Andreas Petersen, løgtingsmaður úr samgonguni, sigur, at tað verður ikki fyrrenn nú, at samgongan veruliga kemur at standa sína roynd.

Hann sigur, at fíggjarlógin fyri í ár er ikki merkt nakað serligt av sparingum, tí enn hevur samgongan ikki havt stundir til at stinga nakran miðvísan fíggjarpolitikk út í kortið.

– Vit hava lagt dent á at varðveita nakrar av okkara grundleggjandi tænastum og summar eru enntá øktar. Hann nevnir heilsuverkið, almannaverkið og skúlaverkið sum dømi.

– Men longu um tríggjar, fýra mánaðir skal samgongan undir at leggja fíggjarlógina fyri 2005. Og tá verður tað, at samgongan veruliga skal standa sína roynd.

Hann sigur, at tað er onki, sum bendir á, at inntøkurnar hjá landskassanum fara at hækka.

– Sostatt mugu vit longu nú gera okkum nakrar tankar um, hvat vit gera næsta ár.

## Avvísir ikki hægri skatti og avgjøldum

Andreas Petersen vísir á, at vit hava 1800 milliónir standandi í landsbankanum. Tað skulu vera minst 1300 milliónir í landsbankanum. Í ár koma vit at brúka 277 milliónir úr landsbankanum. Sostatt ber bara til at brúka góðar 200 milliónir úr landsbankanum afturat næsta ár, so er kvotan longu uppi.

Hann sigur, at í serligum førum ber til at brúka nakað afturat úr landsbankanum, men so skal ein greið ætlan verða løgd fyri, hvussu peningurin skal betalast aftur, tí tað betalast aftur rættiliga skjótt.

Tað skulu altíð eini 15% av bruttotjóðarúrtøkuni standa í landsbankanum.

Løgtingsmaðurin sigur, at sostatt má samgongan síggja veruleikan í eyguni.

Og hann sigur, at veruleikin er, at samgongan noyðist at taka støðu til fleiri sparingar næsta ár fyri at yvirskotið á fíggjarlógini kann minka, tí tað kann ikki verða líka stórt, sum tað er í ár.

– Hin møguleikin er at økja um inntøkurnar hjá landskassanum við at hækka skattir ella avgjøld, leggur hann afturat.

Samgongan hevur ikki verið sinnað tiltøk í gildi fyri at veksa um inntøkurnar, eitt nú við at hækka skattir ella avgjøld. Hevði tú heldur viljað, at tiltøk vórðu sett í verk fyri at sleppa undan sparingum?.

– Eg trúgvi einki uppá, at skattalætti loysir allar trupulleikar. Tað er roynt so nógva staðni. Ein sum royndi tað í ólukkumát var amerikanski forsetin Reagan, men hann mundi koyrt USA á heysin. Skattalætti eggjar ikki til meiri virksemi og tað tók USA meiri enn 10 ár at koma fyri seg aftur eftir skattalættan hjá Reagan.

Andreas Petersen heldur avgjørt ikki, at skattur er av tí ringa.

– Nógvastaðni síggja vit streymin av flóttafólki úr londum, har tey als ikki betala skatt til lond, har skatturin er høgur. So tað er ikki skatturin, sum ræðir fólk.

Andreas Petersen er sannførdur um, at tað heldur er spurningurin um hvørjar tænastur og hvønn tryggleika, vit fáa afturfyri skattin.

– Tað, sum fólk vilja hava, er eitt trygt heilsuverk, trygg kor á ellisárum og trygg, sosialar umstøður, sum heild og ein góðan skúla. Og tað betala tey fegin skatt til.

Hann heldur, at tað er gamaní at hava til politiskan boðskap, sumsigur, at skattur og avgjøld skulu lækka.

– Men skulu vit síggja veruleikan í eyguni, kann tað væl henda, at tað verður neyðugt hjá landinum at fáa fleiri inntøkur, fyri at varðveita tænastustøðið, sigur hann.

Hann hevur kortini ikki gjørt sær tankar um, hvussu tað skuldi verðið sett í verk.

– Men tað kundi verið við at hækka onkur avgjøld ella við at breiðka skattagrundarlagið. Eitt nú er ikki tann stóri skatturin í Føroyum á inntøkum, sum eru vunnin við reinari spekulatión.

Hann nevnir sum dømi, tá ið partabrøv verða handlað og hann nevnir eisini fólk, sum eiga nógv hús, men sum selja burturav.

– Tey, sum forvinna pening av slíkum spekulatiónum, betala ikki stórvegis í skatti, sigur Andreas Petersen.

# Finnleif sýnir fram í Suðuroy

**Væl dámdi listamálarin, Finnleif Mortensen, hevur í hesum døgum framsýning í listaskálanum, Oynni, á Tvøroyri**

LISTAFRAMSÝNING
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Finnleif Mortensen er hugtikin av føroysku bygdini og tí skiftandi ljósinum. Hetta er fyrstu ferð, at hann sýnir fram í Suðuroy og fleiri málningar eru eisini av bygdum í Suðuroy. Her er Finnleif avmyndaður í Oynni á Tvøroyri leygardagin, tá ið framsýningin læt upp*

Leygardagin læt Finnleif Mortensen av Argjum upp listaframsýning í listaskálanum, Oynni, á Tvøroyri.

Við á framsýningini hevur hann 21 oljumáln ingar og hetta er fyrstu ferð at hann hevur framsýning í Suðuroy.

Annars hevur hann havt nógvar framsýningar norðanfyri og hann hevur verið við bæði á Ólavsøkuframsýningini og á várframsýningini.

Hann hevur nýliga havt framsýning í Smiðjuni í Lítluvík í Havn og tað er týðiligt, at hann er ein listamálari, sum fólk hava tikið til sín, tí har seldi hann tað mesta at tí, hann hevði á framsýningini.

Finnleif hevur røtur bæði úr Sandvík og úr Fámjin og fleiri av málningunum á framsýningini í Oynni eru av bygdarløgum í Suðuroy. Yvirhøvur er hann ógvuliga hugtikin av føroyska bygdarlagnum og tí skiftandi ljósinum.

Finnleif Mortensen er annars radiomekanikari og hann ferðast nógv kring landið í sínum arbeiði. Hann sigur, at hann hevur altíð blokkin við sær, tá ið hann ferðast og tað spyrst ofta málningur burturúr tí.

Framsýningin hjá Finnleif Mortensen er opin til 24. apríl.

Opið er hvønn dag frá klokkan 15 til 20, men mánadag er stongt.

Nú á páskum verður kortini ikki opið Langa Fríggjadag og fyrsta páskadag. Annars verður opið bæði skírishósdag og 2. páskadag



# Fyrsta føroyska operan

**Eivør Pálsdóttir, Kristian Blak, Sunleif Rasmussen og mong onnur navngitin fólk eru við í tí fyrstu føroysku operuni "Arnhild og Eyðstein", sum verður frumframførd í Útvarpi Føroya Langa fríggjadag**

TÓNLEIKUR
*Annika B. Mortensen*



*Fróði Sandoy, Herfinnur Árnafjall, Ernst Sondum Dalsgaard og Eivør Pálsdóttir eru øll solistar í »Arnhild og Eyðstein«*

Tað er norðmaðurin Willy R. Kastborg, sum kom við hugskotinum. Hann helt at føroyasøga hevði verið ein stórsligin karmur til eina operu. Willy R. Kastborg er giftur til Føroya og búleikast bæði á Strondum og í Frederiksstad í Noregi. Hann skrivaði hendingagongd og operatekstin og setti seg síðani í samband við Kristian Blak, sum byrjaði at skriva tónleikin til "Arnhild og Eyðstein" í mai mánaða í fjør.



*Willy R. Kastborg, Ovi Olsen og Kristian Blak*

Operan, sum Dánjal Hoydal týddi til føroyskt, fylgir tveimum ættum í trimum ymiskum tíðarskeiðum í føroyasøgu. Fyrsti partur er í víkingatíðini tá Føroyar vóru kristnaðar, annar er í tíðarskeiðnum tá Føroyar hevði einahandil og Gabel hevði ræðið. Triði partur fer fram í nútíðini har stríðst verður um loysing ella samband við Danmark. Sambært Willy R. Kastborg er talan um eina kærleikssøgu og í øllum trimum tíðarskeiðum eru tað Arnhild og Eyðstein sum hittast.

Eivør Pálsdóttir er Arnhild og Ernst Sondum Dalsgaard er Eyðstein. Ernst er av Velbastað, hann hevur haft viðburð og er vorðin rættiliga kendur sum tenorur á Kongaliga Leikhúsinum í Keypmannahavn, sambært Willy R. Kastborg er Ernst "ein nýggj opera stjørna". Tveir aðrir solistar eru eisini í operuni, tað eru bass sangarin Fróði Sandoy og Herfinnur Ádnafjall, sum lesur tónleik í Islandi. Willy R. Kastborg sigur at talan er um "fýra sera góðir solistar". Kórið Tarita, stjórna av Sunleifi Rasmussen, og seks tónleikarar, flest allir kendir úr bólkinum Yggdrasil, lutaka eisini í "Arnhild og Eyðstein". Finnur Hansen hevur verið teknikari.

Kristian Blak sigur at besta orðið at lýsa tónleikasjangruna er cross-over: "Sangurin er klassiskur, meðan tónleikurin er meira jazz kendur og eisini hevur rock elementir í sær".

Hetta er fyrsta operaverkið hjá Kristiani Blak og alt bendir á at "Arnhild og Eyðstein" fara at røkka út um landoddarnar. Íslendska útvarpið fer í næstum at spæla brot úr operuni og arbeitt verður við at fáa tað sama í lag í Danmark og í Noregi.

Fyrsti partur av "Arnhild og Eyðstein" verður at hoyra í Útvarpi Føroya Langa fríggjadag klokkan 15:15, annar og triði partur verða sendir klokkan 16:45.

